# Sær ljóst út hjá ÍF

**Uttan at taka munnin ov fullan, ber helst til at siga, at ÍF er tann á pappírinum størsti favoritturin, men yvir høvur kann roknast við sigur til øll tey fremstu liðini**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*

ÍF hevur á pappírinum lætta uppgávu leygardagin í dystinum ímóti KÍF. Liðið hjá ÍF gerst bara betri og betri, og í seinasta leikumfari vunnu tær ógvuliga sannførandi á Mjølni í Klaksvík. Tað hendir ikki ofta, at ÍF vinnur í Klaksvík, og tað undirstrikar enn meira, at liðið í ár hevur styrkina og viljan at vinna gullið. Í løtuni sær eingin út til at kunna standa ÍF tørn, og tí er ikki væntandi, at KÍF kann skala toppliðið.

### Klassikari í Klaksvík

Tað vóru tær tíðir, tá ið føroyameistaraskapurin varð avgjørdur í dystinum millum Mjølnir og Fleyr. Verður hugt at hagtølunum, so hevur Mjølnir, síðan meistaradeildin varð skipað í 1986, vunnið 9 meistaraheiti. Fleyr hevur vunnið 6 meistaraheiti, og bara tvær ferðir hevur annað felag vunnið meitraraheitið – tvey tey seinastu kappingarárini.

Nógv má sigast vera broytt síðan tá, tí hóast Mjølnir enn er við í oddastríðnum, so er felagið als ikki so sterkt sum tá, og um Fleyr er at siga, at støðan er best lýst við stigatalvuni. Hon lýgur ikki, og Fleyr er á aftasta plássi. Bara ein sigur higartil í ár.

Hesin klassikarin er tí ikki so spennandi sum onkuntíð, men tó syrgir søgan fyri, at liðini bæði leggja alt í at vinna. Hjá Mjølni er sigurin avgerandi fyri at fylgja oddaliðnum. Hjá Fleyr má og skal skeiva gongdin vendast og tað kann eins væl gerast í Klaksvík sum aðrastaðni. Tó er als eingin ivi um, at Mjølnir er stórfavorittur undan dystinum.

### Dráttur ógvuliga svingandi

Dráttur hevur higartil í kappingarárinum verið ógvuliga svingandi. Spælið er ov óstøðugt. Í dystinum ímóti Mjølni í vikuni sást hetta skilliga. Dráttur fekk bank og vísti als ikki styrki til at kunna gera seg galdandi í toppinum. Helst má Dráttur taka til tokka við at vera "millumlið" millum toppin og botnin í bestu kvinnudeildini. Møguleiki er hjá vágagentunum at mótprógva hetta í dystinum ímóti TB sunnudagin. Tá skullu aðrir bollar í suppuna, um ikki enn eitt stórtap skal gerast veruleiki. TB-liðið spælir væl og tvørágentur skulu vinna fyri at kunna fylgja ÍF í oddinum, so Dráttur hevur sera torføra uppgávu.

# Stríð um næstu sessirnar

**VB ætlar sær ivaleyst at staðfesta oddasessin í Klaksvík, har VÍF ikki er sinna at slaka í kappingini, og í Havn skulu Kyndil og Neistin gera av, hvørt teirra skal leggja seg í oddastríðið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og hjá monnum, so skulu øll liðini uttan StÍF royna seg í bestu hondbóltsdeildini hjá kvinnum.

Oddaliðið VB fer til Klaksvíkar at royna seg, og einki er at ivast í, at VB ætlar sær fullan førning heim við aftur. Vágskvinnurnar hava longu tryggjað sær, at einki lið fer fram um tær í grundspælinum, og móti skerda Stjørnu liðnum er ikki óhugsandi, at tær kunnu staðfesta oddasessin.

Stjørnan hevur annars havt góð úrslit at vísa á í seinastuni, men nú leikandi venjarin noyddist av landinum, gav hetta at bíta móti VÍF, sum vann ein knúsandi sigur seinasta vikuskiftið.

### VÍF fylgir við

Júst VÍF hevur aftur hetta vikuskiftið ein dyst, sum á væl kenda pappírinum eigur at kasta tvey stig av sær. Hesa ferð í Runavík, har botnliðið, Tjaldur, tekur ímóti. Tjaldur hevur í fleiri dystum víst, at liðið kann koma nær ovaru støddu liðunum, men higartil hevur talan bert verið um tann eina sigurin, og tað er ilt at ímynda sær, at hesi hagtøl verða betrað móti VÍF, sum hóast alt framvegis eru tvífaldir føroyameistarar, og sum helst ikki vilja geva hetta heiti frá sær uttan víðari.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið verður í Havn, har Kyndil og Neistin takast. Fyri fáum árum síðani mundi hetta vera dysturin fram um hinar, sum gjørdi av, hvat av liðunum var ovast, tá árið var liðugt, men so er ikki hesaferð. Fyrst og fremst kann sigast um dystin, at hetta er ein uppgerð um, hvørt av liðunum framveigs skal vera partur av stríðnum um heiðursmerki, tá farið verður undir endaspælið.

Heilt krøkt burtur verða tey neyvan av hesum einstaka dystinum, men fyri báðar er galdandi, at mistøkini longu hava verið so nógv í tali, at ráðini nú ikki eru til at missa so øgiliga nógv afturat, um vónin um heiðursmerki skal haldast við líka.

SÍ-Mjølnir 1-3 (17-25, 28-26, 23-25,23-25)

# Mjølnir togaði sigurin heim

Í einum tøttum dysti eydnaðist tað mansliðnum hjá Mjølnir at toga væntaða sigurin móti SÍ til høldar hóskvøldið.

Mett eftir seinastu dystunum – vi undantakið av greiða tapinum fyri ÍF – so mundi fáur ivast í, at klaksvíkingar vóru favorittar at vinna dystin.

Fyrsta settið tóktist alt eisini ganga eftir vild, men so byrjaðu teir á heimaliðnum at muta ímóti. Næsta settinum tóku sørvingar sær av, men hóast teir í teimum báðum næstu vóru heilt nær við, so eydnaðist teimum ikki at koppa gestunum, sum báðu ferðirnar vóru tað lítla og avgerandi pettið kaldari, tá tað veruliga stóð á.

Við sigrinum syrgdu Mjølnir fyri, at teir nú liggja heilt væl fyri í stríðnum um at gerast næstir ÍF á stigatalvuni.

Sørvingar kunnu hinvegin bert aftur staðfesta, at tað enn eina ferð gjørdist til næstan fyri teirra viðkomandi.

**-jm**

# Býráðið stuðlar Tórsvølli

**Mentamálanevndin hjá Tórshavnar Býráð hevur gjørt av at játtað FSF eina millión í stuðli til liðugtgerð av bygninginum við Tórsvøll**

FSF-BYGNINGURIN
*Jákup Mørk*

Eftir at ymsu fótbóltsfeløgini í landinum á teimum báðum seinastu aðalfundunum hava kjakast dúgliga um, hvat er rætt og ikki at gera við ætlaða bygningin við Tórsvøll, er gongd nú loksin komið á arbeiðið.

Eftir at bygnignurin í fjør varð klæddur eru menn nú farnir í holt við at gera sjálva innrættingina lidna, og nú er so eisini líkt til, at fíggingin av bygninginum gerst nakað lættari, enn lagt varð upp til frammanundan.

Tórshavnar Kommuna hevur nevnliga gjørt av játta Fótbóltssambandinum eina millión í stuðli til endamálið. Stuðulin er tó treytaður av, at Grunnurin Tórsvøllur fær loyvi at nýta hølini hjá FSF til VIP-tiltøk, tá tørvur er á hesum, eins og grunnurin skal hava atgongd til vátrúmini og búrunum, tá hesi verða gjørd.

Á aðalfundinum hjá FSF fyrr í ár varð metti kostnaðurin fyri liðugtgerðina10,4 mió kr, harav 2,2 mió kr. skuldu fíggjast við láni. Men hendan byrðan verður so væntandi nakað minni, nú Býráðið hevur gjørt av at stuðla ætlanini.



*Fótbóltssambandið hevur nú fingið hjálp frá Tórshavnar Býráð til liðugtgerð av bygninginum við Tórsvøll*



# Trolari av Orknoyggjunum tikin




Fiskiveiðieftirlitið tók hósdagin trolaran Keila, sum er hevur heimstað í Kirkwall á Orknoyggjunum.

Fólk frá fiskiveiðieftirlitið vóru umborð og funnu útav, at nøgdin av fiski, ið skipið hevði upplýst var umborð, var ikki røtt.

Eftir metingunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum var 1-2 tons minni umborð av fiski, enn upplýst varð.

Øll skip, sum skulu undir fiskiskap á føroyskum øki, eiga at upplýsa nøgdina av fiski, ið er umborð, áðrenn farið verður undir fiskiskap.

Tá upplýst verður ov lítið av fiski, ber til at fiska munin, uttan at hetta fer av kvotuni.

Málið varð sent til fútan, og skiparin á Keila skuldi fáa eitt sektaruppskot, men hvat víðari er hent við málinum hevur ikki eydnast okkum at fingið upplýst, hóast fleiri royndir.

**-HR**

# Nýggj jólafløga við gentubólkinum Drós

FLØGUÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*



*Anna Kristin Bæk*



*Annika Midjord*



*Gunnfríð Gunnarsdóttir Guttesen*



*Meibritt Rasmussen*



*Malan Hansen*

Í hesum døgum er ein nýggj jólafløga á føroyska marknaðinum - klár at fáa jólahýrin fram í okkum øllum. Tað er gentubólkurin Drós, ið er mannaður við fimm føroyskum gentum við drúgvum sangroyndum, ið gevur eina sera fjølbroytta og øðrvísi jólafløgu út.

Í Drós eru fimm føroyskar kvinnur í aldrinum 24-33 ár, allar búðsitandi í Keypmannahavn. Tær eru Malan Hansen, Kristin Bæk, Annika Midjord, Meibritt Rasmussen og Gunnfríð Gunnarsdóttir Guttesen.

Malan úr Fuglafirði og hinar úr Havn.

Drósini hava sungið saman síðani 1994 og luttikid á ymsum tiltøkum í Keypmannahavn. Limirnir hava royndir úr ymsum høpum, millum annað í føroyskum kórum. Kristin Bæk, sum var við í sangleikinum Sjeyk, er óivað hon, føroyingar kenna best.

Tilfarid á fløguni er sera fjølbroytt. Hugskotið er at endurnýggja og víðka um føroyska jólasangstilfarið.

Fløgan fevbur tí um eitt nú sálmar, popptónleik, dansitónleik og kórsatsir. Í høvudsheitum eru tað gamlir sangir í nýggjari útseting, men eisini eru trý heilt nýggj løg við føroyskum lagi og teksti at finna.

Drós hava havt fleiri tónleikaligar leiðarar hesi átta árini.

Á hesi fløguni er tað Benjamin Gaasedal og Maria Guttesen, sum stjórna og hava gjørt fleiri av útsetingunum av løgunum, Eyðfinn Jensen hevur útsett eitt lag. Eisini hevur Maria Guttesen skrivað tvey løg til endamálið, tað eina syngur hon sjálv. Tað triðja nýggja lagið er ein sangur, sum Steintór Rasmussen hevur gjørt orð og lag til, tað lagið syngur Kim Hansen.

Fløgan er innspæld saman við Eyðfinni Jensen og Leivi Thomsen í studionum hjá MediaMusic.dk og TUTL hevur givið út.

Fløgan er at fáa kring alt Føroya land og í føroyingahúsunum í Keypmannahavn og Århus.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 15.12 | 14.30 | Kyndil-Neistin |
| 15.12 | 14.30 | Tjaldur-VÍF |
| 15.12 | 15.00 | Stjørnan-VB |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 14.12 | 16.00 | KÍF-H71 |
| 15.12 | 16.00 | Kyndil-Neistin |
| 15.12 | 16.00 | Tjaldur-VÍF |

### Flogbóltur

Meistaradeild, kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 14.12 | 13.00 | ÍF-KÍF |
| 14.12 | 13.00 | Mjølnir-Fleyr |
| 15.12 | 14.00 | Dráttur-TB |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 14.12 | 15.00 | ÍF-Fram |
| 14.12 | 15.00 | Mjølnir-Fleyr |

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 9 | 8 - 0 - 1 | 225 | 181 | 44 | 16 |
| 2 | VÍF | 10 | 6 - 0 - 4 | 228 | 186 | 42 | 12 |
| 3 | StÍF | 10 | 5 - 1 - 4 | 237 | 243 | -6 | 11 |
| 4 | Stjørnan | 9 | 4 - 1 - 4 | 191 | 198 | -7 | 9 |
| 5 | Kyndil | 9 | 4 - 0 - 5 | 215 | 215 | 0 | 8 |
| 6 | Neistin | 10 | 3 - 2 - 5 | 192 | 210 | -18 | 8 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 1 - 0 - 8 | 176 | 231 | -55 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 11 | 8 - 0 - 3 | 317 | 277 | 40 | 16 |
| 2 | VÍF | 11 | 7 - 1 - 3 | 345 | 279 | 66 | 15 |
| 3 | Neistin | 10 | 7 - 0 - 3 | 282 | 266 | 16 | 14 |
| 4 | Kyndil | 10 | 5 - 2 - 3 | 274 | 263 | 11 | 12 |
| 5 | KÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 255 | 265 | -10 | 7 |
| 6 | H71 | 10 | 2 - 0 - 8 | 235 | 290 | -55 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 2 - 0 - 8 | 242 | 310 | -68 | 4 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 9 | 7 - 2 | 23 | 9 | 14 | 14 |
| 2 | ÍF | 9 | 7 - 2 | 25 | 12 | 13 | 14 |
| 3 | Mjølnir | 8 | 5 - 3 | 19 | 12 | 7 | 10 |
| 4 | Dráttur | 8 | 5 - 3 | 18 | 17 | 1 | 10 |
| 5 | KÍF | 9 | 1 - 8 | 7 | 24 | -17 | 2 |
| 6 | Fleyr | 8 | 1 - 7 | 6 | 24 | -18 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 7 | 7 - 0 | 21 | 0 | 21 | 14 |
| 2 | Fram | 7 | 4 - 3 | 14 | 10 | 4 | 8 |
| 3 | Mjølnir | 6 | 4 - 2 | 12 | 9 | 3 | 8 |
| 4 | SÍ | 7 | 2 - 5 | 8 | 15 | -7 | 4 |
| 5 | Fleyr | 7 | 0 - 7 | 0 | 21 | -21 | 0 |